SKÚLIN VIÐ STREYMIN

Ársætlan fyri støddfrøði í 5. flokki

Skúlaár	2020/2021
Skúli	Skúlin við Streymin
Flokssstig	5. flokkur
Lærugrein	Støddfrøði
Lærari	Thordis Dahl Hansen

Ársætlan fyri lærugrein	***Tøl og algebra*** • at lesa, skriva og samanbera tøl uppí 100 000 • støðubundu talskipanina og við tíggjunadapørtum, hundraðpørtum og túsundapørtum og at raðskipa slík desimaltøl og at set tey á tallinju • at fata brot sum part av heild og sum part av mongd, at leingja og stytta brot og at samanbera brot • at umskriva millum brot og desimaltøl • additión og subtraktión av brotum við ymiskum nevnara • at falda tøl við broti • additión og subtraktion við fleirsifraðum tølum á ymsan hátt, harundir við fyrisettari algoritmu • líttlutabell • at finna primtøl og at taka samansett tøl sundur í faktorar • sambandið ímillum teir fýra roknihættirnar og at brúk tað at loysa uppgávur við • at nýta fleiri roknihættir í samband við praktiska rokning • at samanbera tøl og støddfrøðiligar framsagnir við teknunum ‹,› og = • at skilja tekstuppgávur og gera støddfrøðiligar fyrimyndir av tekstinum **Geometri** • at nevna og greina eginleikar við trídemensjonalum skapum • at byggja trídimensjonal skap og tekna tey • at tekna perspektiv við einum hvørvipunkti • at nýta krosstøl til at vísa staðseting, rørslu og spegling í einari krossskipan • at rokna frástøður í einari krossskipan út frá krosstølum **At máta** • at rokna yvirflata og rúmd á prismum • at máta og rokna ummál og areal á fleirkantum • at umskriva millum ymisk mál fyri rúmd og vekt

SKÚLIN VIÐ STREYMIN

- at máta og rokna við vekt og tíð

Hagfrøði og sannlíkindi

- at lýsa og meta um sannlíkindini fyri eini hending við orðum og við tølum millum 0 og 1
- at rokna líkindi fyri einføldum hendingum

At skriva uppgávur niður

- Í 4. flokki fluttu næmingarnir seg frá bert at nýta einnýtistilfar til at so gott, sum allar uppgávurnar skulu skrivast í eitt roknihefti. Nú tey eru komin í 5. flokk er eins stórur tørvur fyri at venja at skriva tað, sum gjørt verður, niður á pappír. Men fyri ikki at flyta fokus frá støddfrøðini, brúka við einnýtslutilfar til summar uppgávur.

Tilfar

Vit brúka lærubókarøðina "Rokning" 5a + 5b.
Av tí at várhálvan í 4. flokki var merkt av óregluligari skúlagongd, er eisini brúk fyri at venda aftur til tað tey burdu havt við sær í 4. flokki.
Umfram lærubókarøðina verður eisini annað tilfar brúkt, so sum tilfar onnur hava gjørt, men eisini heimagjørt tilfar. Hetta er alt fyri at skapa forstáilsi og áhuga fyri lærugreinini.

Eisini skal nettøkt tilfar brúkast.

Arbeiðsháttur:

Arbeiðshátturin er skiftandi. Skift verður ímillum at næmingurin situr sjálvur og arbeiðir, at næmingarnir arbeiða í smærri og størri bólkum og at lærarin hevur upplegg.

Spæl skal eisini vera ein sjálvsagdur partur av undirvísingini.

Tá ið rættuliga gongd er komið á undirvísingina og øll kenna seg tryggan við lærugreina og umstøðurnar, byrja vit at brúka "vikuskema" at skipa partar av undirvísingina við.

Heimaarbeiði

Næmingarnir hava **regluliga heimaarbeiði** – heimaarbeiðið er altíð tílíkt næmingarnir duga, men sum krevur **venjing**.